LM-103/2020

3.

Maria Róin

Fra: Mimi Steintórsdóttir <mimi@sokn.fo>
Sendt: 26. januar 2021 15:39
Til: Annika Petersen
Cc: Anna Borg Dahl; Guðrun Poulsen
Emne: SV: Uppskot til løgtingslóg um økisnøvn til hoyringar

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

FO-ráðið takkar fyri hoyringsmøguleikan og hava bert smávegis viðmerkingar til uppskotið til Økisnavnalóggávu.

Viðmerkingarnar til grein 9, stk. 2, skjóta upp, at tað er umsitarin, sum skal tryggja, at upplýsingar um skrásetara eru rættar alt skrásetingartíðarskeiðið. Hetta er ein avbjóðing, tí kannað verður í dag ikki leypandi hvør er skráskrásetari ella um skrásetingar eru leypandi rættar og dagførdar. Í dag er kravið sambært viðskiftatreytunum, at tað til einhvørja tíð er skrásetari, sum hevur skyldu at hava egnar upplýsingar dagførdar, serliga um skrásetari ynskir at vera sjónlig (Whois).
Um tað skal vera umsitari, sum skal halda eygað við skrásetingum alt skrásetingartíðarskeiðið, vil hetta hava við sær munandi meirarbeiði hjá umsitingini, sum harvið eisini óivað hevur eyka kostnað við sær. FO-ráðið mælir til, at varðveita verandi skipan, sum er, at tað er skrásetari sum til einhvørja tíð hevur skyldu at hava egnar upplýsingar rættar og dagførdar, meðan umsitari (FO-ráðið) til tekur sær av dátagrunninum.

Allar ásetingar um krøv til mannagongdir, trygd og avtalur eru viðurskiftir, sum FO-ráðið longu arbeiðir við.

Vinarliga
Vegna FO-ráðið

Mimi Steintórsdóttir, adv. og forkvinna í FO-ráðnum.
Fartlf. +298 50 60 30

Fra: Annika Petersen <AnnikaP@uvmr.fo>
Sendt: 12. januar 2021 15:18
Til: Mimi Steintórsdóttir <mimi@sokn.fo>
Cc: Anna Borg Dahl <Annaborgd@uvmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um økisnøvn til hoyringar

Til FO-ráðið.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um økisnøvn verður við hesum sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **týsdagin 26. januar 2021.**
Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíðar heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráðið.